# Ein gudsvælsignað vinnulívsmafia

**- Støðan í føroyska vinnulívinum minnir um støðuna í Sovjet undir Politbureaunum. Vit eru fullkomiliga í lummunum á nøkrum fáum vinnulívsmonnum, sum taka avgerðirnar. Møguliga er tað ein stokk konservativ bólkur í føroyska samfelagnum, sum hevur eina konservativa protestantiska áskoðan, sum byggir á, at tey ríku eru tey, ið eru mest vælsignað av Guði, sigur bersøgni hvalbiarpresturin Ólavur Rasmussen í viðtalu við Sosialin**

SAMRØÐA
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*– Havi eg hug at fáa mær ein dans, fái eg mær tað. Tað skal eingin blanda seg í og hatta tími eg ikki at krógva heldur. Fyri okkum prestar ger tað sama seg galdandi, sum fyri øll onnur menniskju. Sting fingurin í jørðina, har sum tú ert staddur, men sting hann ikki so djúpt, at tú missir teg sjálvan burtur, sigur Ólavur Rasmussen.*

Ein tjúkkur smádrongur, sum ikki dugdi at siga, hvaðani hann var ættaður, hevur vaksið seg stóran og bersøgnan.

Hann er nakað fyri seg á føroyska prestaliðnum, og tá ið hann hittir pressuna, smæðist hann ikki við at sessast á einum av skeinkistøðunum í høvuðsstaðnum – Hafnia Lounge.

Ólavur Rasmussen hevur alla orsøk til at smírast. Og tað ger hann eisini.

Presturin í Hvalba sigur seg vera tiknan á bóli av góðu móttøkuni, sum bók hansara um Kierkegaard hevur fingið. Hann hevur selt tvey uppløg upp undir jól, og bókini hevur fingið nógva umrøðu.

Og nú, hann setir niður at tosa um seg sjálvan, átrúnað og annað, er hann í einum stórum kolli og selum. Hann torir at siga sína hugsan hart, og hann torir at verða sín egni. Ólavur Rasmussen tykist ikki órógvaður av at vera óvanliga bersøgin og erligur.

– Eg var ræðuliga tjúkkur sum barn. Eg var nógv tjúkkari enn onnur børn, og tað hevði við sær, at øll hildu tað vera ónormalt. Eg minnist, tá eg gekk í vøggustovu í Søborg í Danmark kallaðu øll meg fyri "Bamse". Tey tóku synd í mær, men hildu hinvegin eisini, at eg var øgiliga fittur. Eg varð kortini ikki argaður, men øgiliga nógv mussaður, tí tað verður tú eftir øllum at døma, tá tú ert ein fitt og tjúkk bamsa, fortelur Ólavur Rasmussen stórflennandi.

### Staðleysur

Uppvøksturin hjá hvalbiarpresti hevur verið rættiliga ólíkur øðrum føroyskum børnum, sum eru uppvaksin í sekstiárunum. Foreldrini hjá Ólavi vóru ávíkavist prestur og jarðarmóður, og hetta hevði við sær, at hann flutti javnan bústað. Fyrstu árini hevur hann búð í Klaksvík, á Eiði, niðri í Havnini, í Hoyvík og í Danmark. Ólavur Rasmussen sigur seg minnast hava havt ein góðan og ikki minst fjølbroyttan uppvøkstur.

– Eg havi ongantíð fatað tað sum strævið, at mamma og pápi vóru noydd at flyta so ofta. Hinvegin var tað eitt sindur strævið ikki at vita, hvaðani tú stavaði. Allir minir javnaldrar kundu siga, at teir vóru frá einum ávísum stað, men tað bar ikki hjá mær. Eg var rættiliga nógv hjá ommu og abba á ávíkavist Skála og í Hvalvík, og tað er tað nærmasta, eg kann siga, hvar eg eri frá, greiðir Ólavur Rasmussen frá.

Tað fellur ikki hvørjum smádrongi í lut at vera sonur at einum presti, og spurdur, hvussu tað var at vaksa upp sum prestasonur, svarar Ólavur:

– Eg havi ongantíð hildið tað vera strævið, og heldur ikki nøkur avmarking. Pápi hevur altíð havt ein frískan hugburð, og eg minnist meg ongantíð verða argaðan at vera prestasonur. Eg gjørdi tað, eg hevði hug til, og eg havi eins og flestu ung gingið í býnum og annað, sum øll onnur ung gjørdu tá.

### Vildi gerast skipari

Á sumri í 1977 verður Ólavur Rasmussen studentur úr Hoydølum. Longu tá hevur hann roynt seg til sjós fleiri ferðir, og hugurin til sjógvin var stórur. Eftir studentsprógvið var ætlanin at gerast skipari.

– Eg var mín fyrsta túr til sjós sum fjúrtan ára gamal og mær hevur altíð dámað ótrúliga sjólívið. Umborð eru bara tú, manningin og havið, og júst tað hugtekur meg. Tú hevur møguleika at gloyma allar sorgir á sjónum. Eg ætlaði mær altíð at gerast skipari, men mín ringa sjón forðaði hesum, fortelur Ólavur Rasmussen.

Tá hann ikki kundi gerast skipari, stóð valið millum gudfrøði ella løgfrøði. Valið fall á tað fyrra.

– Eg havi ongantíð kent tað sum trýst at gerast prestur, tí pápi var tað. Hinvegin hevur tað óivað ávirkað mítt val. Eg var ikki serliga hugtikin av gudfrøðini í fyrstani. Gudfrøði er ein samanrenning millum mállærugreinar og heimspeki, og serliga parturin við málunum, hevði eg lítlan áhugað í. Hinvegin fangaði kirkjusøgan og heimspekin meg, sigur Ólavur Rasmussen

Tey, sum velja at lesa gudfrøði kunnu skjótt skriva undir upp á, at júst tann lesturin verður vanliga fataður, sum eitt sindur øðrvísi enn hjá fólki, sum velja at lesa meira vanligar lærugreinar sum løgfrøði, til sjúkrasystir ella maskinsmið. Hetta kemur allarhelst av føroysku fatanini, at prestur hevur ein serligan leiklut í samfelagnum og tað eru fastar reglur fyri, hvussu ein prestur skal bera seg at.

Spurdur, hvussu tú verður uppfataður av tínum javnaldrum, tá ein lesur gudfrøði, svarar Ólavur Rasmussen:

– Eg kundi serliga øsa

*Framhald á næstu síðu*